Fróðskaparsetur Føroya

23. februar 2006

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 2/2006

Tíð: Hósdagin 23. februar 2006, kl. 13.00-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

## Dagsskrá:

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 1/2006 setursráðsfundi 31. januar 2006.** Frágreiðingin góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

## Mál at taka støðu til / umrøða:

3. **Nýtt býti fíggjarjáttan 2006.** (J.nr. 0015-01595). *Fundarskjal: Uppskot til býti, dagfest 17.2.06 ,8 s.* Býti samtykt við tí fyrivarni, at deildirnar eftirkanna um nóg mikið av peningi er til rakstur. Í sambandi við skriv frá Mentamálaráðnum um játtan til undirvísingarútgerð, er gjørt vart við at játtanin aftur í ár bert er latin til partvíst keyp av kopimaskinum á SSD og FMD. Hetta ger at tað er ivasamt um til ber at skifta maskinurnar út. Setursskrivarin tekur spurningin upp við Mentamálaráðið.

4. **Sjálvevaluering/dygdarmenning.** (J.nr. 0017-01639). Málið fekk drúgva umrøðu. Fyrst vóru viðmerkingarnar hjá Náttúruvísindadeildini og Setursskrivstovuni umrøddar, síðani varð kjakast um víðari prosessina í málinum. Semja um at heita á deildirnar um at halda regluligar starvsfólkafundir um málið. Setursskrivstovan varð biðin um at finna fram til eksternan ráðgeva, sum kann ráðgeva okkum víðari.

5. **Kunngerðin um útbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum** (J.nr. 0010-00508). **Uppskot um broyting av § 1, stk 2, 1 og 2.** *Fundarskjal: Bræv frá rektaranum, dagfest 16.2.06, 1 s.* Sum ein avleiðing av at Náttúruvísindadeildin hevur stytt BS útbúgvinginar, sum vóru 3½ ár til 3 ár, verður heitt á Mentamálaráðið um at broyta


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

kunngerðina, so allar Bachelor útbúgvingar framyvir verða 3 ár. Setursskrivstovan avgreiðir málið.

6. **Upptøka til lestrarárið 2006/07.** (J.nr. 0040-01758). Upptøkur verða sum samtykt í søgu, føroyskum og í lívfrøði. Støða verður í næstum tikin til, um takast skal upp til stjórnmálafrøði í ár, ella um hetta skal bíða til komandi ár.

**7. Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 21.2.06.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 21.2.06.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

**8. Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Laust B. Pedersen, professara á Jarðfrøðideild á Uppsala Universiteti sum próvdómara til skeið *Innan kolvetnisverkfrøði.* At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**9. Góðskriving. Náttúruvísindadeildin mælir til, at John Jákupsson Petersen fær lærugreinina *Introduksjon til kjemi og kjemisk biologi* frá Universitetet i Tromsø góðskrivaða fyri skeiðið *Alisevnafrøði 6 ECTS* á Stødd-/alisfrøði-støðisnáminum. At góðkenna.** (J.nr. 0046-01803). Góðkent.

**Kunningarmál:**

**10. Mánaðarjavni ultimo desember 2005, nýtsla fyri alt setrið 19.071.700 kr = 100% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

**11. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur heitt á Anniku Sølvará at luttaka í strategibólki, sum skal gera *uppskot til strategi fyri økið útbúgving*. Hetta er partur av Visjón 2015-ætlanini.** (J.nr. 0011-01807).

**12. Starvsfólkamál:**
   a. **Óli Simonsen er settur í starv sum KT-leiðari, hann byrjaði 13.2.06.** (J.nr. 0021-01767og 0022-01804).
   b. **Náttúruvísindadeildin lýsir eftir Ph.D.-studenti í leitingarjarðalisfrøði, freist at søkja er 13.3.06.** (J.nr. 0021-01794).

**13. Umvælingarjáttan 2006. Játtanin er í ár 100.000 kr. Samtykt at skifta punkteraðar rútar á Náttúruvísindadeildini, mála vindeygu uttan og innan í Reins húsi, mála vindeygu í gongini á Setursskrivstovuni og umvæla (pussa og mála) WC-rúmið á niðastu hædd á Føroyamálsdeildini.** (J.nr. 0015-01607).

14. **NUAS stórseminar (norðurlendska universitetsfyrisitarasamstarvið) í Keypmannahavn 20.-22.8.06, tema: Globalisering, marknad, konkurrens.** (J.nr. 0014-01792).

15. **Frá Vinnumálaráðnum:**
    a. **Uppskot til vinnupolitikk** ***Visjón 2015, Vinnupolitikkur til aðalorðaskifti 2005***
    b. **Uppskot at gera granskarapark** ***Granskarapark, Frágreiðing og tilmæli í sambandi við at stovnseta granskarapark – ískoyti til uppskotið til vinnupolitikk 2005.***

16. **Bachelor-uppgáva hjá Henriette Rosing, studenti við Ilisimatusarfik** ***Afhængighed af tilkaldt arbejdskraft. En Komparativ analyse. Er Grønland mere afhængig af tilkaldt arbejdskraft end Færøerne?*** **Henriette fekk námsferðarstuðul í 2004.** (J.nr. 0071-01126).

17. **Unireport 2005, Wissen für die Zukunft, Universität Zürich.**

Frágreiðing: Annika Sølvará